# Leiðari til Býarbókasavnið

www.torshavn.fo

**Søkt verður eftir býarbókavørði í Tórshavnar kommunu.**

**Býarbókasavnið**
Tórshavnar kommuna setti Býarbókasavnið á stovn 1. apríl 1969. Býarbókasavnið er eitt nýmótans bókasavn við trimum deildum, barnabókasavni, útláni fyri vaksin og lesistovu. Býarbókasavnið hevur eisini regluligt samstarv við skúlabókasøvnini í kommununi.

Á bókasavninum eru 11,5 ársverk, og starvsfólkini eru 14 í tali. Rakstrarútreiðslurnar hjá Býarbókasavninum fyri 2009 vóru íalt 8,47 mill.kr.

Býarbókasavnið er opið seks dagar um vikuna, og í 2009 hevði bókasavnið 80.679 vitjanir.

Ætlanin er í næstum at broyta hølini hjá Býarbókasavninum, soleiðis at ein partur av bókasavninum verður í veghædd, og verður hetta eisini ein avbjóðing hjá nýggja leiðaranum at skipa fyri.

Meira fæst at vita um Býarbókasavnið á www.bbs.fo.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:**
- at leiða og hava ábyrgd av dagliga virkseminum á Býarbókasavninum, bæði mótvegis starvsfólkum og viðskiftafólkum
- at tryggja eitt tíðarhóskandi, mennandi og dygdargott umhvørvi
- at tryggja, at bókasavnið hevur fullgóða fíggjarstýring og fremur úrslit
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**Førleikakrøv**
- bókavarðarútbúgving frá viðurkendum norðurlendskum bókasavnsskúla ella akademiska bókavarðarútbúgving frá lærdum háskúla
- royndir í bókasavnsarbeiði
- royndir í leiðslu og samstarvi
- góður teldukunnleiki og áhugi fyri kunningartøkni

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið á bókasavninum og kunna ganga á odda.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Starvið verður lønt sambært sáttmála hjá avvarðandi yrkisfelag í samsvari við útbúgving og royndir.

Leiðarin á Býarbókasavninum hevur tilvísing til mentamálaleiðaran.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. mai 2010 kl. 12. Merkið umsóknina „Leiðari til Býarbókasavnið".

**Meira fæst at vita**
Sí meira um starvið og útgreinaðan starvsprofil á www.torshavn.fo undir „leys størv". Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra, á tel. 302010.

**Tórshavnar kommuna er høvuðsstaðarkommuna.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# LEIÐARI TIL BARNAHÚSIÐ MARGIT

**Klaksvíkar Kommuna søkir eftir leiðara til Barnahúsið Margit at byrja 15. juni 2010 ella eftir nærri avtalu. Starvsstaðurin er á Traðagøtu 31. Stovnurin lat upp á heysti 2007 og er skipaður við 2 vøggustovum við 24 børnum, 2 barnagarðsstovum við 40 børnum og einum útibarnagarði við 35 børnum. Útibarnagarðurin liggur úti í Grøv.**

**Vit bjóða tær:**
- Ein spennandi, nýggjan stovn við góðum karmum
- Útbúgvin og dugnalig starvsfólk
- Møguleika at mynda og byggja víðari á arbeiði við høgum fakligu støði
- Tætt samstarv við kommunalu umsitingina
- Góðar starvsfelagar í leiðarabólkinum

**Arbeiðsuppgávur:**
- Skapa trivna fyri starvsfólk, børn og foreldur
- Skipa fyri starvsfólkafundum, foreldrafundum og øðrum felagsvirksemi
- Umsitingarligar uppgávur so sum fíggjarætlan, lønir, inngjaldingar o.a.
- Fylgja við og skipa so fyri, at fyriskrivaðar reglur verða fylgdar

**Fakligir førleikar:**
- Tú hevur útbúgving sum námsfrøðingur
- Tú hevur hug og hegni at leiða, motivera og samstarva
- Tú hevur námsfrøðiligar hugsjónir um virksemið á einum dagstovni
- Tú hevur hegni til tann umsitingarliga partin og telduførleika
- Tú dugir væl at orða teg í skrift og talu á føroyskum

**Persónligir eginleikar:**
- Tú hevur gott yvirlit og ert før/-ur fyri at ganga á odda
- Tú leggur dent á góðsku og á høgt fakligt støði
- Tú ert kveikjandi og før/-ur fyri at geva íblástur til starvsfólkið
- Tú ert før/-ur fyri at skilja støðuna hjá øðrum og dugir at loysa trupul leikar
- Tú hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er at seta frá 15. juni 2010.
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag. Starvið er flokkað frá lønarstigi 24 til 30.

Skrivlig umsókn saman við prógvi og viðmælum skal sendast til Klaksvíkar Kommuna, Nólsoyar Pálsgøta 32, 700 Klaksvík.
**Umsóknarfreistin er 21. mai kl. 12.00.**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hedvig Jóhansdóttir, leiðara, á tel. 47 45 30 ella Sigrun Vágstún, barnaansingarsamskipara á tel. 41 00 00.

**Klaksvíkar Kommuna**
**Nólsoyar Pálsgøta 32**
**700 Klaksvík.**

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík | Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo